

## Ulrich funnið formin

Týski súkklumaðurin Jan Ulrich hevur verið fyri hørðum atfinningum í ár. Orsøkin er, at úrslitini hjá honum í ymiskum súkklukappingum hava ikki verið av teimum bestu. Yvirvekt og manglandi fokus hava verið millum atfinningarnar ímóti týska súkklaranum, men nú hevur pípan fingið annað ljóð. Ulrich vann sunnudagin einkultstartin í kappingini Kring Sveis, og hann tóktist betur fyri enn nakrantíð áður í ár. Í næstum verður stóra súkkukappingin Tour de France hildin, og líkt er til, at Ulrich er við at gerast klárur til kappingina.

## Federer á hædd við Borg

Roger Federer hevur nú tangerað metið hjá Bjørn Borg við sigrum í 41 dystum á rað á grasvølli. Federer vann sunnudagin finaluna í ATP-kapping í týska býnum Halle, og tað var kekkin Tomas Berdych, sum stóð fyri skotum.

– Hetta er ein stór løta fyri meg, sigur Roger Federer, sum herfyri tapti finaluna í French Open. Hon var tó ikki spæld á grasi, tí á grasi er tað eingin, sum vinnur á Federer. Seinast Federer tapti á grasi, kallaðist ár ið 2002, og kappingin var Wimbledon.

# Eli vann dramatiska kapping

**Spenningur og drama var í luftini tá TSF leygardagin skipaði fyri landavegsúkklukapping. Eli Christiansen vann ein tættan endaspurt, og samanstoytur var millum fleiri súkklarar**

SÚKKLING
*Tíðindaskriv*

Tórshavnar Súkklufelag skipaði leygardagin fyri kapping í landavegsúkkling. Teinurin gekk úr Havn, móti bergholinum í Kaldbaksbotni, til Kollafjarðardal og eftir Oyggjarvegnum til Havnar. Startur og mál var við Plantusøluna við Hvítanesvegin. Teinurin er góðar 42 km langur, og leygardagin skuldi súkklararnir koyra teinin tvær ferðir, tvs. 84 km.

Veðrið var av tí besta, og menn fóru við góðum huga uppá súkklurnar kl. 9 leygarmorgunin. Men kappingin var ikki meira enn byrjað tá dramatikkurin meldaði sína komu. Áræka Sundsverkið vóru menn óansnir og tað endaði við at tveir súkklarar rendu saman og máttu gevast.

Enn einaferð fingu súkklararnir sjón fyri søgn um hvønn týdning ein hjálmur hevur. Hjálmurin hjá Sigmund Olsson knekkaði av stoytinum hann fekk tá hann rakti asfaltið, og ikki er torført at ímynda sær hvat hevði hent um ongin hjálmur var á høvdinum hjá Sigmundi.

### Eli vann endaspurtin

Allir vóru skelkaðir av hendingini, men kappingin helt kortini fram. Tá menn byrjaðu niðankoyringina úr Kollafjarðardali byrjaði tað at følast í beininum, og komnir niðan á vóru tað Eli Christiansen, Torkil Veyhe, og Gunnar Dahl-Olsen, ið fylgdust. Tað gjørdu teir líka til koyrt bleiv aðru ferð niðan úr Kollafjarðardali. Tá byrjaðu kreftirnar hjá Torkil at ganga undan, og Eli og Gunnar sloppu tí undan Torkil. Kappingin stóð nú bara millum hesar báðar. Gunnar royndi tað hann kundi at sleppa undan Eli, men illa gekk, og hvørja ferð megnaði Eli at "lukka holið", og koyra Gunna inn aftur. Kappingin bleiv tí avgjørd við einum endaspurti, ið Eli vann við hálvari súkklulongd.



*Hesa ferð eydnaðist hjá Eli at basa Gunnari, sum annars hevur vunnið flestu kappingarnar her heima seinnu árini*

### Torkil og Sverri ein góðan dag

Tað sást á øllum brøgdum at Torkil hevur ment seg nógv, og gjørdi hann ein góðan figur leygardagin. Eina løtu royndi hann at koyra undan Eli og Gunnar, men hann bleiv innheintaður nakað seinni. Eisini veteranurin Sverri Mohr Edvinsson hevði ein góðan dag, og verður hugsað um, at hann koyrdi allar teir 84 km at kalla einsimallur, var tíðin hjá honum rættiliga góð. Sverri koyrdi teinin uppá 2 tímar 52 minuttir og 24 sekund.

### Aðrar kappingar

Longu týskvøldið skulu súkklararnir í eldin aftur. Tá verður koyrdur ein einkultstartur. Leiðin gongur frá Plantusøluni við Hvítanesvegin, niðan á Oyggjarvegin, og endar heilt uppi á Sornfelli. Teinurin er góðar 20 km langur. Tað ljóðar ikki av nógvum, men at koyra frá landsvegnum niðan á Sornfelli er ein drúgvur teinur.

Mikudagin fara nakrir súkklarar til Íslands at kappast í kappingini Tour de Iceland. Hendan kapping er smíðað eftir sama konsepti sum Statoil kring Føroyar, har koyrt verður í fimm dagar á rað. Hart, men stuttligt og spennandi.0

STARVSLÝSING

## Hjálparfólk

**Søkt verður eftir hjálparfólki til starvsfólkadeildina at byrja umleið 1. juli. Starvsfólkadeildin varðar av starvsfólkamálum, skrivstovufyrisiting og aðrari umsiting.**

**Arbeiðsuppgávur**
Arbeiðið fevnir í høvuðsheitum um telefonavgreiðslu í móttøkuni, avgreiðslu av posti og aðrar innanhýsis uppgávur hjá stovninum.

**Førleikakrøv**
Søkt verður eftir fólki við students-, HF- elle HH-prógvi, og sum helst ætla sær at fara undir víðari útbugving um eitt ár ella so.

Tann, sum verður settur, skal kunna arbeiða sjálvstøðugt, vera nærlagdur og vanur at brúka teldur og KT-skipanir.

**Setanarviðurskifti**
Løn og setanartreytir annars vera sambært sáttmálanum millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið.

**Umsóknir**
Umsóknin verður send til:
Landsverk
Postmoga 78
FO-110 Tórshavn
ella við telduposti til fmp@lv.fo, merkt við "Hjálparfólk til starvsfólkadeildina".

Umsóknin skal verða okkum í hendi í seinasta lagi 26. juni 2006.

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Fanny M. Petersen, starvsfólkaleiðara, á tlf. 540 811.

**Landsverk** er ein stovnur undir Vinnumálaráðnum, og hevur um hendi vega- og havnamyndugleikauppgávur og byggiharrauppgávur. Stovnurin ráðleggur og ger ætlanir, útinnir, rekur og viðlíkaheldur landsvegir, havnir, bygningar, og flogvallamál, herundir tyrlupallar.

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn,
Tel 340 800, Faks 340 801 lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK byggir land

sansir.fo

STÁLSMIÐJUM

Søkt verður eftir royndum stálsmiðjum til havnaarbeiðir at byrja, skjótast tilber.

Áhugaðir kunnu venda sær til skrivstovu okkara ella til Jón Danielsen á tel. 210.683.



ARTICON
á Hjalla · Postboks 3109 · 110 Tórshavn
tel. 350700 · fax 350705